

# Nýggju evn

**– Tað passar okkum nógv betri, at politikkur er farin at fevna um mál sum umhvørvi, innflytaramál, etik og yvirgang, tí hesi liggja nógv betur til konservatismuna enn tá politikkur var var stættabýttur í ídnaðarsamfelagnum, sigur konservativi politikarin og danski uttanríkisráðharrin, Per Stig Møller, sum um vikuskiftið vitjaði á landsfundinum hjá Fólkaflokkinum**

KONSERVATIVUR POLITIKKUR

*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

"Vinstra høgra vinstra høgra tað er rætta lagið". Fyri at læra børnini at ganga syngja vit í barnagarðinum um at vinstra og høgra bein mugu samstarva fyri, at vit kunnu finna rætta lagið.

Stóran part av farnu øld var semja um, at tað var rætta lagið at býta politisku flokkarnar í vinstra og høgra. Siðbundna býtið millum høgra og vinstra stavar frá ídnaðarsamfelagnum, har bláu kapitalistarnir og reyðu sosialistarnir stríddust um at býta virðini. Ídnaðarsamfelag er í dag farið í søguna, og vit hava í dag eitt samfelagið, sum grundleggjandi øðrvísi enn fyri bert 30 árum síðan.

Tað ber ikki til longur til at avmarka politikk til at snúgva seg um skatt, løn og sosialar ábøtur av ymiskum slag, tí onnur meira virðisløðd mál hava stungið seg upp á samfelagskjakinum. Í rúgvuni kunnu nevnast umhvørvi, innflytaramál, yvirgangur, menningar-hjálp, harðskapur og etisk mál.

Sonevndu virðisløddu málini gera eisini sítt til, at býtið millum høgra og vinstra í politikki gerst kámari og kámari. Nýggju málini seta øðrvísi krøv til flokkarnar til áhaldandi at menna seg fyri at fylgja við.

Ein av gomlu og siðbundnu politisku hugsjónunum er konservatisman, og vit hava sett konservativa politikaranum og danska uttanríkisráðharranum, Per Stig Møller, stevnu til eitt prát um, hvussu nýggja rákið við málum sum innflyting og yvirgangi passar til konservativu lívsáskoðanina.

## Sum fótur...

Per Stig Møller tykist ikki verða fjálturstungin av stóru broytingunum, sum hava verið á politiska kjakinum seinastu árini seinastu árini-heldur tvørturímóti. Fyrrverandi formaðurin í Konservativa flokkinum í Danmark hevur skrivað fleiri bøkur um konservativu lívsáskoðanina, og hann heldur at nýggja rákið passar konservativu hugsjónini sum fótur í hosu.

– Tey nýggju málini er ein gáva til konservatismuna, tí hvar var konservatisman í stættarsamfelagnum? spyr uttanríkisráðharrin.

Hann vísir á, at stuðulin fyri Konservativa flokkurin í Danmark altíð hevur fevnt breitt, og at stuðulin gekk tvørtur um stættir í einum annars stættabýttum samfelag.

– Í gamla býtinum vóru vit flokkurin hjá yvirklassanum, arbeiðarum, húsmøðrum, embætisfólki og pensionistum. Tað kendist ofta eitt sindur marg-háttligt, at vit sum flokkur fevndu yvir fleiri stættir, tá samfelagið í stóran mun var stættarbýtt, fortelur Per Stig Møller.

– Tað passar okkum nógv betri, at politikkur er farin at fevna um mál sum umhvørvi, innflytaramál, etik og yvirgang, tí hesi liggja nógv betur til konservatismuna. Okkara aðalmál hevur altíð verið, at eitt samfelag má og skal hanga saman. Vit skulu tryggja, at samfelagið verður latið komandi ættarliðum í góðum standi. Fyri at gera tað, má samfelagið fyri alt ikki býtast sundur, men verða varðveitt sum ein eind. Júst eindarsamfelagið er eitt heitt politiskt evni í dag, har serliga trupulleikarnir viðvíkjandi innflytarum og teirra rættindum fær størri og størri ávirkan á samfelagskjakið, greiðir 62 ára gamli uttanríkisráðharrin glógvandi frá.

Í hesum viðfangi fortelur hann frá, at hugtakið "Sáttmáli millum ættar-liðini" framvegis er ein aðaltáttur í konservativu lívsáskoðanini, hóast stórar rembingar